LØGTINGSGRANNSKOÐARARNIR
Hergeir Nielsen – Sverre Midjord – Óli Breckmann – Olav Enomoto

*Argir, 2. november 2005*
J.nr.: LGR 2005/501-8
(at tilskila í brævi)

Føroya Løgting
Skrivstovan
Tinghúsvegur 1-3
Postrúm 208
110 Tórshavn

**Viðv. frágeiðing um “frávik millum játtan og nýtslu o.a. fíggjarárið 2004**

Við hesum verður frágeiðingin frá Landsgrannskoðanini um “frávik millum játtan og nýtslu o.a. fíggjarárið 2004”, sum er dagfest 26. oktober 2004, latin landsstýrismanninum sambært § 18 í Ll. nr. 25/1999 um grannskoðan av landsroknskapinum v.m. (lógargreinin og viðmerkingarnar eru endurgivnar niðanfyri).

Vegna Løgtingsgrannskoðararnar

Hergeir Nielsen
formaður

/Leivur Harryson
skrivari

**§ 18** í Ll. nr. 25/1999 ”um grannskoðan av landsroknskapinum v.m.”:

”*Stk. 1.* Løgtingsgrannskoðararnir kunnu lata løgtinginum tær frágreiðingar, ið nevndar eru í §§ 12, 14 og 17 saman við møguligum viðmerkingum. Slíkar frágreiðingar verða at senda landsstýrismanninum, samstundis sum tær verða latnar løgtinginum.

*Stk. 2.* Áðrenn ein frágreiðing verður latin løgtinginum, kunnu løgtingsgrannskoðararnir biðja roknskapargrannskoðanina, landsstýrismannin ella aðrar landsmyndugleikar um at útvega fleiri upplýsingar viðvíkjandi teimum málum, sum eru umrødd í frágreiðingini.”

Brot úr viðmerkingunum til **§ 18:**

**”**At løgtingsgrannskoðararnir kunnu lata løgtinginum frágreiðingar, sum ásett er í § 18, er ein nýskipan. Talan er ikki um frágreiðingar, sum verða lagdar fyri tingið sum uppskot til samtyktar, og sambært tingskipanini verður ein tílík frágreiðing tí viðgjørd eftir § 80, stk. 2, sum ásetir, at "skriv til løgtingið verða ikki skrivað í gerðabók ella upplisin á tingfundi uttan í teimum førum, løgtingsformaðurin heldur, at talan er um serligt undantak. Skrivini verða fjølritað, eitt eintak til formannin í hvørjum flokki á tingi…".

Verður tingskipanin ikki broytt, kann orðaskifti e.a. vanliga ikki verða um tær frágreiðingar, sum løgtingsgrannskoðararnir lata løgtinginum. Men sambært § 52 í tingskipanini kunnu løgtingsmenn seta munnligar og skrivligar fyrispurningar um almenn viðurskifti til løgmann ella landsstýrismenn. Sostatt hava løgtingsgrannskoðararnir og aðrir tingmenn møguleika til at seta løgmanni ella landsstýrismanni fyrispurning viðvíkjandi viðurskiftum, sum eru lýst í einari frágreiðing, sum verður latin løgtinginum sambært § 18.”

Traðagøta 43 ▪ Postrúm 2053 ▪ FO-165 Argir
☏ (298) 35 51 00 ▪ 🖷 (298) 35 51 01 ▪ 💻 gralands@post.olivant.fo